## Shell stuðlar Javna

Marknaðarleiðarin hjá Føroya Shell, Niclas Heri Jákupsson, hevur handað felagskapinum Javna eina peningagávu á 15.000 krónur. Dagligi leiðarin hjá Javna, Anna D. Háberg, takkaði mangar ferðirnar fyri, og segði, at Javni ætlar at nýta peningin til eitt PREP skeið, sum verður á Hotel Vágum í september mánaði. Hettar er eitt hjúnarbandsskeið til pør, sum eiga børn við breki. Í Danmark og Noreg verður hettar skeið bjóðað foreldrum at brekaðum børnum. Prep er ikki ókent á okkara leiðum, tó er hettar fyrstu ferð, at tað verður hildið fyri pørum at brekaðum børnum. Javni vónar, at hettar kann verða eitt skeið, sum kann haldast í Føroyum hvørt ár ella annað hvørt ár. Niclas Heri Jákupson sigur, at Shell fegnast um at kunna stuðla slíkum vælgerandi endamálum – tí hetta er júst í tráð við stuðulspolitikkin hjá felagnum.



## Dagtilboð á Mørkini

Í Streymnesi fara tey nú at skipa fyri felagsvenjingum fyri pensjónistum, sum búgva í Sundalagnum og á Eiði. Dentur verður lagdur á fyribyrgjandi-, viðlíkahalds-, og styrkivenjingar. Aftaná verður kaffi og hugni við ymiskum tiltøkum. Endamálið er at økja nøgdsemið hjá tí einstaka brúkaranum, og at brúkarin so leingi sum til ber verður sjálvhjálpin bæði heima og úti. Venjingarnar verða mánadag og mikudag kl. 14-16. Byrjað verður mánadagin 31. mars kl. 14 í ergo- og fysioterapiini. Í sambandi við venjingarnar koyrir bussur til og frá eftir ynski. Tað eru tær báðar økisterapeutarnir í Heimatænastuni øki 2: Benadicta Ellingsgaard, fysioterapeutur og Martha Reyðberg, ergoterapeutur, sum standa fyri venjingunum.

# Yvir 100 milliónir meiri til vælferð hjá verkafólki

**Føroya Arbeiðarafelag umhugsar at biðja samgonguna sleppa ætlanini um at lækka blokkin úr Danmark og heldur brúka peningin til at avtaka oljuavgjaldið og til at bøta um ALS og barnsburðargrunnin**

RÍKISVEITINGIN
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Samgongan ætlar at lækka blokkin, samstundis sum hon ætlar at leggja eyka byrðar á verkafólkið og tað ætlanina mugu vit royna at fáa samgonguna at sleppa, varð sagt á aðalfundi í Føroya Arbeiðarafelag um vikuskiftið*

Hví skal samgongan lækka ríkisveitingina úr Danmark og samstundis leggja eyka byrðar á verkafolki?

Tað var ein spurningur, sum var til umrøðu á aðalfundinum í Føroya Arbeiðarafelag um vikuskiftið.

Tað var Harry Benjaminsen av Toftum, sum reisti spurningin og hann helt, at Føroya Arbeiðarafelag átti at gjørt vart við seg í hesum máli.

Hann vísti á, at í hesum valskeiðnum hevur samgongan sett sær fyri, at ríkisveitingin úr Danmark skal lækka upp ímóti 150 millónum krónum tilsamans.

- Hví skulu vit siga nei til nei, til hendan peningin, spurdi Benjaminsen.

Hann vísir eisini á, at samstundis ætlar samgongan at bøta um ALS og barnsburðarskipanina og tað merkir, at fólk verða boydd at betala meir.

- Hví skal samgongan lækka ríkisveitingina úr Danmark, samstundis sum hon ætlar at leggja eyka byrðar á verkafólkið, spurdi hann.

Hann helt, at tað hevði verið rættari at brúka hendan peningin til at bøta um fólkapensjónina, til at bøta um ALS og barnsburðargrunnin og ikki minst, til at lækka oljugjaldið fyri.

- Tað hevði sanniliga munað, segði Harry Benjaminsen.

Hann bað tí staðiliga á nevndina í Føroya Arbeiðarafelag umhugsa at heita á samgonguna um at sleppa ætlanini um at strika ríkisveitingina úr Danmark og ístaðin um at brúka peningin til at lætta um byrðarnar hjá verkafólki, ístaðin fyri at leggja eyka byrðar á fólk afturat.

Ingeborg Vinther helt, at hetta var ein tanki, sum var verdur at hugsa meiri um.

- Tá ið politikarar taka avgerðir, hugsa teir ikki um at tað samstundis verða lagdar eyka byrðar á landsins borgarar.

## Gjald og vald skulu fylgjast

**Ingeborg Vinther fegnast um, at samgongan ætlar at bøta um barsilsskipanina, men skulu partarnir á arbeiðsmarknaðinum hava rokningina, skulu teir eisini hava valdið**

BARNSBURÐARSKIPAN
*Áki Bertholdsen*

Nú verður tosað um at leingja barsilstíðina upp í eitt ár, og samstundis skulu pápanir nú fáa álagt við lóg at vera heima hjá barninum ávíst tíðarskeið í hesum árinum, barnsburðarfarloyvið varar.

Tað fegnast Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag um á aðalfundinum í Føroya Arbeiðarafelag um vikuskiftið.

Barnsburðarskipanin er ein skipan, sum partarnir á arbeiðsmarknaðinum sjálvir gjalda. Men Ingeborg Vinther staðfestir, at eins og ALS, er heldur ikki Barsilsskipanin nøktandi fyri tímalønt

Ingeborg Vinther sigur alt gott um, at tað skal vera møguligt at vera heima hjá barninum í eitt ár.

- Men tað krevur, at inngjaldið til Barsilsskipanina hækkar. Og tað merkir so aftur, at antin mugu partarnir á arbeiðsmarknaðinum gjalda meir, ella má landskassin gjalda tað, sum í restar.

Ingeborg Vinther staðfestir, at tað, sum samgongan ætlar, er, at tað skal vera arbeiðsmarknaðurin, sum skal gjalda eykarokningina.

- Tá er lagamanni hjá samgonguni at leingja barsilstíðina, tá ið partarnir á arbeiðsmarknaðinum skulu gjalda. Men samstundis er tað eisini ætlanin, at landsmyndugleikarnir framvegis skulu hava valdið á skipanini, so at teir kunnu áleggja arbeiðstakarum og arbeiðsgevarum fleiri og fleiri gjøld.

- Men skulu vit gjalda, mugu vit eisini hava ábyrgdina og stýrið á skipanini. Alt annað er heilt burturvið, staðfestir Ingeborg Vinther.

# Lønin skal upp tá prísirnir fara upp

**- Vit fáa bara minni og minni fyri pengarnar og tí er neyðugt at fáa gomlu skipanin aftur í gildi, har lønirnar vórðu prístalsviðgjørdar, sigur Føroya Arbeiðarafelag. Tað merkir, at lønirnar hækka automatiskt so hvørt, sum prísirnir fara upp**

PRÍSTALSVIÐGERÐ
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*- Nú er tíðin komin, at seta skipanina í gildi aftur, har lønirnar verða prístalsviðgjørdar, halda tey í Føroya Arbeiðarafelag*

Skipanin, har allar lønir vórðu prístalsviðgjørdar, eigur at verða sett aftur í gildi, so at lønirnar hækka so hvørt sum prísirnir í handlunum hækka.

Tað heldur Føroya Arbeiðarafelag.

Á aðalfundinum um vikuskiftið varð nógv tosað um, at prísirnir á alskyns vørum eru so nógv hækkaðar í seinastuni, at í løntakarar fáa als onki burtur út teimum lønarhækkingum, sum eru.

Tvørturímóti minkar keypiorkan alsamt og fundarfólkið umrøddi dúgliga, hvussu tann gongdin kann vendast.

Í hesum sambandi varð tosað um at fáa gomlu skipanina aftur í gildið, har lønirnar verða prístalsviðgjørdar.

Gamla skipanin var so, at hvørja ferð prístalið hækkaði trý stig, hækkaði tímalønin 60 oyru.

Var tann skipanin í gildið nú, hevði tímalønin í dag verið 60 oyru hægri enn hon er nú, tí prístalið hækkaði so mikið nógv í fjør.

Tað eru nú fleiri ár síðani, at prístalsviðgerðin av lønunum varð avtikin í kreppuárunum.

- Men nú er tíðin komin til at hon verður sett í gildið aftur og tað fara vit at royna at fáa politikararnar at gera, sigur hon.

- Hendan gongdin, har prísirnir hækka meiri enn lønirnar, kann ikki halda fram, leggur hon afturat.

Tað endaði við, at aðalfundurin hjá Føroya Arbeiðarafelag samtykti at heita á nevndina í felagnum um at virka fyri at fáa lønirnar prístalsviðgjørdar.

Hon vísti eisini á, at Føroya Arbeiðarafelag hevur heitt á politiska myndugleikarnar um at taka oljugjaldið av og at lækka mvg á neyðsynjarvørum, eitt nú á breyði og á mjólk.

Hetta hevði serliga komið teimum lágløntu og pensjónistum til góðar.

Hon segði eisini, at Føroya Arbeiðarafelag ætlar at fylgja væl við, so at samgongan ikki skal sleppa undan at viðgera hesar spurningarnar.